

# Ætlan um tveir frystitrolarar slept

Nógv bleiv gjørt burturúr, tá íslendska reiðaríið Rammi hf. skrivaði undir sáttmála við norsku skipasmiðjuna Solstrand Verft um at byggja tveir flakatrolarar. Teir skuldu vera 70 metrar langir, næstan 15 metrar breiðir og skuldu latast í 2009 og 2010. Kostnaðurin fyri teir báðar trolararnar var 400 milliónir norskar krónur, og hetta var størsti einstaki sáttmáli, sum Solstrand Verft nakrantíð hevur gjørt. Men nú er øll byggiætlanin slept. Fíggjarkreppan hevur noytt íslendska reiðaríið at boða skipasmiðjuni frá, at byggingin verður av ongum.

# Sansir ger tað væl við nýggjari heimasíðuskipan

**Við nýggju heimasíðuskipanini Sansir.net 2.0 er tað vorðið lættari enn nakrantíð at gera heimasíður og dagføra tær. Við fleiri enn 150 føroyskum og útlendskum heimasíðum á baki hevur Sansir.net prógvað, at tað er ein dygdargóð skipan. Ein av hesum er heimasíðan hjá Faroe Petroleum, ið varð kosin besta heimasíða á AIM keypskálanum í London fyrr í á**

KUNNING OG SAMSKIFTI
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

At hava eina vælvirkandi og livandi heimasíðu er vorið eitt sera týðandi samskiftis- og søluamboð. Tosa vit um eitt nú virkir og stovnar, so eru tað nógv, ið vilja hava eina heimasíðuloysn, ið er ómaksleys at brúka og at umsita, og sum samstundis gevur nógvar og fjølbroyttar møguleikar.

### Sansir slóðar vegin

Hetta hevur fingið Sansir, sum eru serkøn í heimasíðuloysnum, at menna eina skipan, ið tey rópa Sansir.net. Ein víðkað versión er júst komin á marknaðin, ið kallast Sansir.net 2.0.

Sansir.net 2.0 er so løtt at brúka, at við hesari skipan kunnu øll røkja og dagføra eina heimasíðu. Harafturat gevur Sansir.net 2.0 nógvar møguleikar. Við henni ber til at gera broytingar beinleiðis á heimasíðuni, líkamikið hvar tú ert staddur. Til ber at minka og klippa myndir beinleiðis í Sansir.net 2.0, og tað sparir tíð og orku samanborið við, um ein skal viðgera myndirnar í einum øðrum forriti fyrst, áðrenn tær verða lagdar út á heimasíðuna, sigur Tór Verland Johansen, samskiftis- og internetráðgevi hjá Sansum; og hann heldur fram:

Tað er lætt at kanna heimasíðuna, áðrenn hon verður gjørd virkin, og hon hevur eina neyva brúkarastýring, sum er eitt hent amboð hjá arbeiðsplássum við nógvum starvsfólkum, sum hvør í sínum lagi skulu dagføra síni økir á heimasíðuni.

Lítið er at ivast í, at Tór Verland Johansen og hansara starvsfelagar á Sansum eru ikki tey einastu, sum dáma hesa heimasíðuskipanina væl. Sansir hevur veitt sínar tænastur til hópin av viðskiftafólkum – ikki bara í Føroyum, men eisini í útlandinum. Higartil er tað blivið til fleiri enn 150 fyritøkur, feløg, stovnar og kommunur, sum hava ognað sær heimasíðu, ið er bygd á Sansir.net. Ein av hesum heimasíðum er tann hjá Faroe Petroleum í Aberdeen, ið vann ein prís fyrr í ár sum besta heimasíða millum tær umleið 1700 fyritøkurnar á AIM keypskálanum í London.

### Donsk fyritøka vann innanhýsis prís

Nýliga vann ein útlendsk fyritøka ein innanhýsis prís hjá Sansum, ið tey rópa »Ársins Sansir.net-loysn 2008«. Hetta hendi tann 30. oktober í ár, tá nýggja Sansir.net 2.0 varð víst fram fyri umleið 70 fólkum umboðandi ymsar fyritøkur, feløg, stovnar og kommunur. Vinnari gjørdist fyritøkan Norsk Rejsebureau, og Jeanette Førstø úr Norsk Rejsebureau, sum er ein hin elsta ferðaskrivstovan í Danmark, var komin til Føroya at taka ímóti heiðurslønini. Hon segði soleiðis:

Vit ynsktu eina professionella heimasíðu, ið var løtt at brúka, og tað fingu vit. Sansir.net er ein sera brúkaravinarlig skipan, og vit hava havt stóra gleði av teimum mongu møguleikunum, sum hon gevur.

Tað var á deildini hjá Sansum í Danmark, at avtalan millum Sansir og Norsk Rejsebureau kom í lag.

Norsk Rejsebureau hava sýnt stóran arbeiðshug og sett seg væl inn í allar møguleikarnar í Sansir.net skipanini. Eisini hava tey lagt dent á dygdargott innihald, bæði í myndum og í teksti. Heimasíðan verður javnan dagførd við nýggjum ferðamálum og kostnaðarbroytingum og hevur góða og lætt lesiliga kunning um tænastur og vørur, sigur Tór Verland Johansen.

Heimasíðan hjá teimum kann síggjast á www.norskrejsebureau.dk

Eitt annað sum Sansir hevur lagt seg eftir er at menna skipanina soleiðis, at hon kann koyra á bæði Mac og PC. Nevnast kann eisini, at skipanin hevur tekstviðgerðarforrit við millum annað føroyskum rættstavara, ið er sera líkt Word hjá Microsoft, og so hevur skipanin eisini eina væl virkandi tíðarstýring, sum kann brúk-




*Tór Verland Johansen handar Jeanette Førstø frá Norsk Rejsebureau heiðurin »Ársins Sansir.net-loysn 2008«*

## Stutt um skipanina

**Sansir.net 2.0 er ein skipan til alnet og intranet heimasíður, ið er løtt og smidlig at brúka. Skipanin letur upp í einum internetkaga, og tað ger, at tað er skjótt og lætt at gera dagføringar og broytingar, líkamikið hvar ein er staddur – á arbeiðsplássinum, í útlandinum ella heima við hús.**
**Sansir.net er ein sokallað »Content Management Skipan« (CMS), ið byggir á nýggjastu tøknina hjá Microsoft.NET. Hon er grundað á standard modulir, sum eru løtt at arbeiða við og kann nýtast til bæði til Windows og Mac OS.**

Kelda: Sansir